Upptakt 7. umfar

SEKS DYSTIR UPP Á FIMM DAGAR

Komandi fimm dagarnar verða seks dystir í landskappingini hjá monnum. Í kvøld verður útsetti dysturin millum Víking og B36, meðan 7. umfar strekkir seg yvir tríggjar dagar – frá sunnudegnum til týskvøldið

TRÓNDUR ARGE

Tað er nógvur føroyskur fótbóltur komandi dagarnar. Í kvøld verður útsetti dysturin millum Víking og B36, sum bleiv útsettur vegna veður sunnudagin 14. apríl. Sunnudagin verða tveir teir fyrstu dystirnir í 7. umfari í landskappingini hjá monnum. HB fær vitjan av Skála, meðan tvørmann fara longu leiðina til Klaksvíkar.

Mánadagin verður botnuppgerð á Eiði, har EB/Streymur fær vitjan av venjaraleysa ÍF. Orsaka av útsetta dystinum millum Víking og B36, so spæli hesi bæði liðini sínar dystir týskvøldið. Víkingur er á vitjan á Argjum, meðan B36 er á vitjan í Runavík.

Hjá kvinnunum verður helst føroya "longsti" dystir, tá EB/Streymur/Skála tekur móti ÍF/Víkingi/B68. Í hinum dystinum í 7. umfari tekur KÍ móti B36.

Víkingur-B36 (Beinleiðis á FM1)

FRÍGGJADAGIN *klokkan* 18.00

DÓMARI: DAGFINN FORNÁ

Hetta er útsetti dysturin, sum ikki bleiv spældur sunnudagin 14. apríl vegna veður. Tað var nógvur vindur í Sarpugerði. Hóast spælararnir vóru á vøllinum og hitaðu upp, so valdi Dagfinn Fornná at útseta dystin.

Hetta passaði betri fyri gestirnar, ið fingu tríggjar spælarar skaddar í upphitingini. Benjamin Heinesen fekk eina lítla fipur, meðan málverjin, Hans Jørgensen, fekk hald í ryggin. Eftir forskriftini verða báðir við í kvøld. Hinvegin verður ongin Brian Jakobsen. Hann fekk tvey gul kort í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið móti KÍ.

Heimaliðið hevur fingið fótin fyri seg og kann við sigri leggja seg undir liðina á NSÍ, sum er á fjórða plássi. B36 hevur eftir eina góða byrjan tapt tvær ferðir móti KÍ í Gundadali, men kann við sigri leggja seg aftur á 1. pássið.

Heimaliðið hevur allar profilarnar tøkar, meðan B36 hevur 120 minuttir av hørðum steypafótbólti í beinunum. Uttan Brian Jakobsen skal B36 finna nýggjan áleypara, meðan møguligi skaðin hjá Erlingi Jacobsen kann verða dýrur, tá Adeshina Lawal og Andreas Lava Olsen eru til reiðar.

SOSIALURIN TIPPAR: 2-1

HB-Skála (Beinleiðis á FM1)

Sunnudagin klokkan 15.00

DÓMARI: KÁRI J. Á HØVDANUM

Hjólini hjá HB mæla ikki eins skjótt í ár, sum tey gjørdu í fjør. Sigurin á B71 í steypakappingini var ikki sannførandi, tá hugsað verður um mótstøðuna. HB líkist ikki sær sjálvum frá í fjør, men nú røkist fyri at hópurin er fullmannaður. Ari Mohr Olsen og Sebastian Pingel eru tøkir aftur, meðan Lasse T. Andersen møguliga verður við. Nú er bara Bartal Wardum, sum ikki kann spæla. Hartil hevur Tróndur Jensen verið á vøllinum seinastu tveir dystirnar, meðan norski Andreas Breimyr hevur fingið enn ein dyst í beinini.

Skála heldur fram við góðu gongdini. Liðið vann heili 5-1 á TB í kappingini um Løgmanssteypið, men tað kemur illa við, at Edvin Jakobsen má sita uttanfyri komandi vikurnar. Hann hevur verið stórspælandi.

So illa sum HB hevur spælt seinastu dystirnar – í mun til í fjør – meðan Skála tykist hava viðgongd, so er ikki óhugsandi at Skála fær stig í hesum dystinum.

SOSIALURIN TIPPAR: 1-1

KÍ-TB (Beinleiðis á FM1)

Sunnudagin klokkan 15.00

DÓMARI: DAGFINN FORNÁ

Úr Klaksvík verður sagt, at Deni Pavlovic er tøkur aftur, eftir at hava brotið hondina. Tað kemur væl við, tí Ísak Simonsen hevur leikbann. Hann hevur avloyst Deni Pavlovic í miðverjuni. KÍ hevur av álvara fingið vind í seglini, eftir tveir sigrar í Gundadali móti B36.

Eitt nú hevur ungi Darius Lewis skorað tvær ferðir, meðan norski Torbjørn Grytten vísti góðar taktir í steypasigrinum, tá hann bleiv skiftur inn.

Gestirnir av Tvøroyri skulu ikki avskrivast. Tað hava teir prógvað í ár, men ósigurin á Skála var stórur. Poul Ingason er við aftur, eftir at hann sat yvir í landskappingradystinum móti Víkingi.

KÍ hevur vunnið fýra teir seinastu dystirnar í landskappingini, og er tí favorittur at vinna.

SOSIALURIN TIPPAR: 3-1

EB/Streymur-ÍF

Mánadagin klokkan 19.00

DÓMARI: EILER RASMUSSEN

LIÐ TÍÐINDI

AB

Ikki við: Jákup Pauli Breckmann (lærkrikin 4-6 vikur), Jógvan Jóannesarsson (knæið, 3-4 vikur), Leivur H. Joensen (burturstaddur), Jobin Drangastein (hælsinan), Heðin Stenberg (knæið, 6 vikur), Sørin Samuelsen (leikbann, 4 gul)
Ivasamur: Rógvi Poulsen (sjúkur), Tóki á Lofti (knæið), Mattias Lamhauge (í samráðngum um leiguavtalu)
Við aftur: Mikkjal T. Hentze (knæið)

B36

Ikki við: Brian Jakobsen (leikbann, 1 dag), Símun Rógvi Hansen (knæskaði, 2-3 vikur), Rói Mørk Hentze (knæskaði, 3-4 vikur), Róaldur Jakobsen (fótur, langtíðarskaddur), Hannes Agnarsson (lær, 3-4 vikur)
Ivasamir: Lukasz Cieslewicz (knæ), Michal Przybylski (knæ), Hugin Samuelsen (knæ), Alex Mellemgaard (fótur), Erling Jacobsen (lær)

EB/STREYMUR

Ikki við: Andras Olsen (krossbandið, úti fyri árið), Jóhannes Hansen (krossbandið, mánaðir), Arnar Dam (knæið, úti í vikur), Leif Niclasen (fóturin, óvist), Gestur B. Dam (liðband, vikur).
Ivasamur: Arnbjørn Hansen

HB

Ikki við: Bartal Wardum (baklærið, 2 vikur)
Ivasamur: Lasse T. Andersen (lærið)
Við aftur: Ari M. Olsen (fóturin), Sebastian Pingel (leikbann)

ÍF

Ikki við: Tóri Traðará (slitið krossbandið, úti restina av árinum), Henry Heinesen (nakkin, langtíðarskaddur), Poul N. Mikkelsen (knæið, helst álvarsamt)
Ivasamur: Dánjal á Lakjuni (baklærið)
Við aftur: Høgni Madsen Ikki við: